# Væl nøgdir

*Hóast strótap, so stóð føroyska U-21 liðið seg væl í Minsk*

Jákup Mørk

Føroysku U-21 leikararnir, sum júst eru afturkomnir av ferðina til Hvítarusslands, vóru væl nøgdir um avrikini á ferðini.

**Stórtap**
Svein Rógvi Nielsen, sum er venjari hjá liðnum, sigur við Sosialin, at hóast talan í øllum trimum dystunum gjørdist um stórtap, so vóru teir væl nøgdir um avrikini.

Tríggir dystir vórðu leikti á ferðini, og taptu føroyingarnir 36-16 móti Ungarn, 38-16 móti Hvítarusslandi, meðan tað móti Svøríki endaði 40-16.

Nakað av roki stóðst av U-21 liðnum, stutt undan fráferðini, tí so at siga alt tað upprunaliga liðið var sent heim, eftir venjingarferð til Danmarkar.

Sostatt vóru bert tríggir av upprunaliga liðnum við á ferðini, meðan restin av leikarunum vóru tiknir upp frá U-18 landsliðnum.

**Eingin skomm**
Svein Rógvi helt tó ikki á nakran hátt, at føroyska liðið hevði gjørt sær fyri skommum á ferðini. – Urslitini eru á leið tey somu, sum U-21 liðið fekk í fjør, og eisini fingu vit rós frá mótstøðuliðum okkara, sum hildu nógv um ungu føroysku leikararnar.

Tað skerst tó ikki burtur, at munurin í kropsligu styrkini var øgiligur, og serliga í seinasta dystinum kom hetta sjóndar. Har megnaðu føroysku leikararnir at halda muninum niðri á heilt fáum málum allan fyrra hálvleik, men í seinna hálvleiki orkaðu teir ikki meira, og so skrædnaði alt.

Annars helt venjarin, at nógvi hitin, eini 35 stig, hevði verið til stóran ampa hjá leikarunum, tí eingin air-condition var í nøkrum av hallunum, har føroyska liðið spældi. Serliga helt hann, at hetta bilaði móti Hvítarusslandi, har nógv fólk var í høllini, og har dysturin eisini varð sjónvarpaður.

Besti leikari á ferðini varð Sveinur Justinussen úr StÍF, og afturfyri hetta fekk hann eina gávu frá liðfeløgunum.

# Jón Rói yngstur í 4 ár

*HB leikarin er yngsti leikari, sum hevur skotið mál hetta kappingarárið, men tað er ikki víst, at hetta heldur árið á tamb*



*Yngsti málskjúttin í fyrstu deild higartil í ár er Jón Rói Jacobsen úr HB*

Loksins eydnaðist tað einum av mest lovandi føroysku leikarunum, Jón Róa Jacobsen, at skorað sítt fyrsta mál í landskappingini í 1.deild. Ungi framherjin, ið fylti 17 ár í apríl, legði HB á odda í Gøtu í dystinum móti GÍ, sum havnarmenn vunnu 2-1. Sostatt bleiv U-18 landsliðsspælarin nógv tann yngsti, ið hevur skorað í bestu deildini í ár.

Trý tey seinastu árini vóru yngstu málskorarar í 1.deild eitt sindur eldri, enn Jón Rói Jacobsen er nú. Vit skulu leita aftur til 1996, fyri at finna ein yngri mann, ið hevði gjørt mál í bestu føroysku deildini. Tað var eingin annar, enn núverandi landsliðsleikarin, Jákup á Borg. Fremsti málskjúttin í 1.deild í fjør og fyrraárið var 16 ár og 11 mánaðir, tá hann skoraði sítt allarfyrsta landskappingarmál fyri besta liðið hjá B36. Tað hendi tann 29.september 1996 í 16.umfari, FS Vágar var á vitjan í Havn og fór vestureftir við 5-1 tapi. Jákup økti um leiðsluna hjá B36 til 3-1, tá ið eitt korter var eftir at spæla.

Kortini eru tað fleiri leikarar, sum kunnu sláa aldursmetið hjá Jón Róa í ár. Í hesum sambandi kunnu nevnast klaksvíkingurin Símun Joensen (føddur 12.07.1983), sandoyingurin Kristoffur Vidtfeldt (24.06.1983), og serliga Jann Ingi Petersen úr B68, ið er føddur so seint sum 7.januar 1984, og sostatt ikki verður 17 fyrr enn komandi ár. Allir teir nevndu hava longu roynt seg í 1.deild í ár. Um blaðungi toftamaðurin megnar at skora í hesum kappingarárinum, slær hann eisini tað gamla aldursmetið hjá fuglfirðinginum Høgna á Lakjuni, ið einans var 16 ár, 9 mánaðir og 3 dagar gamal, tá ið hann skoraði eitt av málunum hjá ÍF í 3-1 heimasigrinum á NSÍ í 3. umfari av landskappingini í 1994. Í løtuni hava vit tíverri ongan møguleika fyri at kanna kappingarnar frá árunum áðrenn 1994, fyri at finna uppaftur yngri málskjútta. Lítil ivi er um, at fleiri 16-ára gamlir málskjúttar høvdu verið í kappingini í 1.deild, ið byrjaði í 1942.

IE

**Yngstu málskjúttar í 1. deild síðani 1994**

| | | | | | Aldur roknaður í: | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ár | leikari | føddur | felag | dato | ár | mðr. | dagar |
| 2000 | Jón Rói Jacobsen | 07.04.83 | HB | 28.05 | 17 | 1 | 21 |
| 1999 | Hallur Dam Joensen | 07.03.82 | Sumba | 07.08 | 17 | 5 | 0 |
| 1998 | Súni Olsen | 07.03.81 | GÍ | 28.06 | 17 | 3 | 21 |
| 1997 | Jákup á Borg | 26.10.79 | B36 | 12.08 | 17 | 9 | 16 |
| 1996 | Jákup á Borg | 26.10.79 | B36 | 29.09 | 16 | 11 | 3 |
| 1995 | Heðin á Lakjuni | 19.02.78 | KÍ | 03.09 | 17 | 6 | 15 |
| 1994 | Høgni á Lakjuni | 05.08.77 | ÍF | 08.05 | 16 | 9 | 3 |

# Nú er talið tað sama

*Talið av útlendskum leikarum í fremstu føroysku deildini er nú eins høgt og í fjør*

Talið av útlendskum spælarum í 1.deild er økt støðugt seinni árini, og eftir at tað fyri einum ári síðani varð samtykt at økja loyvda hámarkstalið, hendi aftur eitt skarvslop.

Í 1999 spældu 26 útlendingar í 1.deild, sum tá var nógv hægsta talið nakrantíð.

Tá kappingin í ár byrjaði, bendi lítið á, at útlendingametið frá 1999 skuldi verða sligið, og talið av fremmandum leikarum fór at gerast uppaftur hægri.



*Marek Wierzbicki er ein av útlendsku leikarum, sum hevur verið í Føroyum í nøkur ár*

22 útlendingar spældu við í 1.umfari. Men sum kappingin er liðin, er fremmanda umboðan í bestu deildini økt við fýra monnum afturat. Danin Martin Thomsen kom til GÍ, jugoslavarnir Zoltan Kujundric og Srecko Milicevic gjørdust KÍ-arar, og seinasta vikuskiftið royndi onglendingurin Nathan Haslan seg í B36-búnu. Sostatt kom talið av útlendingum uppá 26, ella tað sama, sum í fjør.

Tað er sera sannlíkt, at onkur annar fremmandur spælari kemur at royna seg í kappingini seinni. Vandamikli jugoslavin hjá Sumba, Nebosja Veljkovic, hevur ikki spælt í ár vegna skaða, men kemur væntandi aftur móti summarsteðginum, og í hesum døgum frættist av Toftum, at ein leikari úr Bosnia fer at royndarvenja við B68.

Tað ber sjálvandi eisini til, at okkurt annað felað fer at styrkja sær hópin við fremmandari arbeiðsmegi.

Størsta umboðan av einum fremmandum landi í føroysku 1.deild er framvegis níggju. So nógvir jugoslavar spældu her í 1998 og 1999. Í 2000 eru jugoslavar aftur mest brúkta útlendska arbeiðskraft, við átta leikarum higartil.

IE

**Útlendingar og teirra feløg**

| | | |
|---|---|---|
| Jugoslavia | 8 | KÍ (3), Sumba (3), VB (2) |
| Pólland | 5 | KÍ (2), VB (2), B71 (1) |
| Litava | 4 | FS Vágar (4) |
| Rumenia | 3 | HB (2), B71 (1) |
| Brasil | 2 | B68 (2) |
| Danmørk | 2 | B71 (1), GÍ (1) |
| Ongland | 1 | B36 (1) |
| Svøríki | 1 | B36 (1) |

# 5 útlendingar í KÍ

*Ongatníð fyrr hevur eitt føroyskt felag gjørt nýtslu av so nógvari útlendskari arbeiðsmegi*

Sum kunnugt, er mest loyvda talið av útlendingum í einum felagi fýra.

Klaksvíkingar hava tó nýtt heili fimm leikarar við fremmandum passi hetta árið. Hetta er gjørligt, tí pólverjin, Marek Wierzbicki, hevur verið í landinum í meira enn ár, og sostatt verður roknaður sum føroyingur í fótbóltshøpi.

Hetta er fyrsta ferðin, at føroyskt felag hevur gjørt nýtslu av fimm útlendingum í sama kappingarári, men enn teir fimm - Marek Wierzbikki, Andrzej Pacek, Zoltan Kujundric, Srecko Milicevic og venjarin Tomislav Sivic - tó ikki verið á vøllinum í senn.

IE

**Feløg og teirra útlendingar**

| | | |
|---|---|---|
| KÍ | 5 | Jugoslavia (3), Pólland (2) |
| FS Vágar | 4 | Litava (4) |
| VB | 4 | Pólland (2), Jugoslavia (2) |
| B71 | 3 | Danmørk, Pólland, Rumenia |
| Sumba | 3 | Jugoslavia (3) |
| B36 | 2 | Ongland, Svøríki |
| B68 | 2 | Brasil (2) |
| HB | 2 | Rumenia (2) |
| GÍ | 1 | Danmørk |
| NSÍ | - | |



# Fyrsti FM-róðurin

*Leygardagin, 3. juni verður norðoyarstevnan, sum er fyrsti FM-róður í hesum róðraárinum*

57 bátsmanningar hava boðað frá luttøku, og niðanfyri verður víst, hvussu hesir verða lagdir.

Á norðoyastevnu er lutur kastaður um nummarrøðina, og verður bátur nr. 1 lagdur vestastur.

Á hinum komandi FM stevnunum verða bátarnir lagdir eftir, hvussu úrslitini vóru á undanfarnu stevnu, soleiðis at fremstu bátarnir á norðoyastevnu verða lagdir í miðjuni á komandi róðri.

**5-mannafør, dreingir**
1. Spógvin
2. Tjaldrið
3. Havfrúgvin
4. Silið
5. Drekin
6. Báran
7. Blikur
8. Royndin Fríða
9. Junkarin

**6-mannafør, kvinnur**
1. Fuglfirðingur
2. Páll Fangi
3. Jarnbardur
4. Sólmundur
5. Hvessingur
6. Lómur
7. Riddarin
8. Gongurálvur

**5-mannafør, gentur**
1. Royndin Fríða
2. Beinta
3. Dúgvan
4. Sílið
5. Spógvin
6. Súlan
7. Ørnin
8. Blikur
9. Junkarin
10. Fípan Fagra
11. Drekin
12. Firvaldur
13. Havfrúgvin
14. Hvassi
15. Bylgjan
16. Frúgvin
17. Tjaldrið

**6-mannafør, menn**
1. Snoprikkur
2. Hósvíkingur
3. Kollfirðingur
4. Gongurálvur
5. Hvessingur
6. Sólmundur
7. Strálan

**8-mannafør**
1. Ørvur
2. Heiðabáturin
3. Miðvingur
4. Toftabáturin
5. Nevið Reyða
6. Gullbrandur
7. Oyndri
8. Argjabáturin
9. Kvívíkingur
10. Húsavíkingur

**10-mannafør**
1. Vestmenningur
2. Vágbingur
3. Nólsoyingur
4. Klaksvikingur
5. Havnarbáturin
6. Eysturoyingur



*Støorur spenningur er um, hvørt nógvu nýggju 10-mannaførini megna at taka Eystuoyriing í ár*

# Renning á norðoyastevnu

*Hóast kappróðurin framhaldandi er aðalítrðottagreinin á stevnunum, so er hetta langt ífrá einasta ítróttin, sum verður á norðoyastevnu*

Jákup Mørk

Í tíðindaskrivi boðar ítróttafelagið, Trystið, frá, at eins og undanfarin ár, verður Føroya Bjór renningin hildin á norðoyastevnu.

Hetta er fjórða árið á rað, at renningin verður fyriskipað, og er hon sostatt nú um at gerast ein fastur táttur í leygardagsskránni á stevnuni.

Luttøkan til renningina hevur eisini verið sera góð, og vóna fyrireikararnir, at hetta eisini verður galdandi í ár.

Sum nevnt, so verður runnið leygardagin, og teinurin, runnin verður eftir, er eftir Skúlavegi, Gerðagøtu og Biskupsstøðgøtu. Byrjað og endað verður við telefonstøðina.

**Partur av Grand-Prix**
Aldursbólkar og longd á teininum eru tey somu sum undanfarin ár, og merkir hetta, at børn undir skúlaaldur renna eitt umfar, meðan børn upp til 12 ára aldur renna tvey umfør.

Vaksnu rennararnir byrja við Talvhusið, og skulu renna fimm km. Kappingin fyri vaksin er samstundis annað umfar í Grand-Prix kappingini, sum DSF skipar fyri.

**Firma-stafett**
Aftur í ár verður roynt at skipa fyri sonevndari firmastafett. Hetta er kapping, har tríggir luttakarar skulu umboða eitt virki, og síðani verður runnið eitt umfar í part. Hetta merkir, at tá fyrsti rennarin hevur runnið eitt umfar, fer næsti rennarin avstað, og endaliga tíðin verður so uppgjørd, tá triði og seinasti rennarin kemur á mál.

Talan skal vera um tríggjar rennarar frá sama virki, og tey í Treystinum heita á luttakararnar í firmastafettini um at vera ílatin eins búnar, so lættari er at halda skil á skiftum v.m.

**Tilmeldan**
Tá síðstu rennararnir eru komnir á mál, verða steyp og heiðursmerki handaði trimum teimum fremstu í ymsu aldursbólkunum. Harumframt fáa luttakarnir eisini okkurt leskiligt frá Føroya Bjór, og drigið verður millum allar luttakararnar um gávur frá ymsu stuðlunum.

Tilmeldan fer fram við telefonstøðina í seinasta lagi hálvan tíma áðrenn renningin byrjar, og verður heitt á rennararnar um at melda til í góðari tíð.

Luttøkugjaldið er 20 kr. fyri børn, meðan vaksin rinda 30 kr., og eru øll sjálvandi vælkomin at luttaka.

Í samband við renningina, og súkklukappingina, sum verður hildin beint aftaná, verður ferðslan í Klaksvík umløgd, og verður víst til lýsing hesum viðvíkjandi.



| kl. | Aldursbólkur | Umfør | Teinur |
|---|---|---|---|
| 12.00 | Børn undir skúlaaldur | 1 | 675 m |
| 12.15 | Børn í skúlaaldri til og við 12 ár | 2 | 1.350 m |
| 12.35 | Vaksin 13 ár og eldri | 7 | 5 km |
| 13.00 | Firma-stafett (3 luttakarar, 1 umfar hvør) | 3x1 | 3x675 m |
| 13.20 | Heiðursmerki og lutakast | | |

# Rógvi komin í gongd aftur

*Hóast venjingarstøðan enn ikki er hin besta, fekk Rógvi Johansen gott úrslit um vikuskiftið*

Jákup Mørk

Skaðarnir, sum Rógvi fekk í Post-Cup kappingini í Ballerup, hava darvað venjing hansara heilt nógv hesar seinastu vikurnar.

Upprunaliga varð ikki hildið, at talan var um nakrar álvarsligar, hóast føroyski súkklarin beinan vegin varð fluttur á sjúkrahús.

**Álvarsligari enn hildið**
Seinni vísti tað seg tó, at talan var um hampuliga umfatandi løstir, tí umframt nógvu skurslini, hann fekk av fallinum, fór nøsin rættuliga illa, hann misti eitt lítið petti av einum fingri og talan varð eisini um skaðar í herðablaðnum og økslini.

Rógvi sigur frá, at hann hevur vant síðani hetta, men hann hevur havt fitt av pínu og trupulleikar við andadráttinum. Kortini gjørdi hann av at royna seg í meistaraheitinum fyri Jútland og Fyn, men vónirnar vóru sjálvandi ikki nakrar serligar undan kappingini.

**Gjørdist nr. 6**
Tað eydnaðist tó Rógva at vinna sær eitt sætta pláss, og vóru bæði hann og venjarin fegnir um hetta, ikki minst tá havt verður í huga, at venjingarstøðan langt ífrá er nóg enn.

Rógvi greiður frá, at rættuliga nógvur vindur var, tá kappingin fór fram, og kanska hevur hetta hjálpt honum í mun til kappingarneytarnar. Í øllum førum sigur vágbingurin, at hetta við vindinum kennist eitt sindur heimligt.

Komandi vikurnar fer Rógvi so at nýta til betra um venjingarstøðuna, og hvør veit, um hann ikki skjótt verður at síggja í heiðursmerkjarøðini, har tað tó sjálvsagt er sera trupult at vinna seg upp.



# Skulu uppeftir

*Hóskvøldið hevði Sogndal møguleikan at vinna seg longur upp á stigatalvuna*

Jákup Mørk

Føroyingarnir í næstbestu norsku deildini hava ikki fingið nakra serliga byrjan upp á kappingarárið.

Seinastu dystirnar hava úrslitini tó verið heldur frægari, og hóskvøldið høvdu teir so møguleikan at vinna seg enn longur upp á stigatalvuna.

**Móti botnliði**
Tá spældi Sogndal móti Sandefjord, sum undan dystinum var á 12. plássi í deildini. Sogndal var undan dystinum á 7. plássi við 9 stigum fyri 6 dystir, og ein sigur í dystinum vil helst innibera, at teir av álvara fara at blanda seg upp í oddastríðið.

Sogndal hevur ein dyst færri enn flestu av hinum liðunum.